Landsbanki Føroya
GOVERNMENTAL BANK

PRODUKTIVITETUR

9. AUGUST 2010

PRODUKTIVITETSVØKSTUR 1999-2009

INNGANGUR OG SAMANDRÁTTUR

Hugtakið *produktivitetur* verður nýtt at lýsa evnini hjá einum landi at framleiða vørur og tænastur *fyri hvørja eind av arbeiðsmegi ella kapitali, ið verða nýtt í framleiðsluni*. Vaksandi produktivitetur er ein fortreyt fyri, at livistøðið í einum landi kann halda áfram at vaksa. Við vaksandi produktiviteti kann hvør lønmóttakari framleiða meira av vørum og tænastum hvønn arbeiðstíma og soleiðis kunnu inntøka, nýtslumøguleikar og livistøði støðugt hækka.

Produktivitetur kann mátast við virðinum á framleiðsluni *fyri hvønn lønmóttakara*; hetta verður kallað *arbeiðsproduktivitetur*. Til ber eisini at máta virðið á framleiðsluni *fyri hvønn tíma*, ið lønmóttakarar arbeiða tilsamans; hetta verður kallað *tímaproduktivitetur*. Tímaproduktivitetur er tó torførur at máta hagfrøðisliga, av tí at ikki ber til at skráseta arbeiðstímar neyvt. Her verður við produktiviteti sipað til hugtakið *arbeiðsproduktivitetur*, har ið annað ikki er tilskilað.

Tekin eru um, at produktivitetsvøksturin í føroyska búskapinum hevur verið lágur seinastu 10-11 árini sammett við okkara grannalond. Neyðugt er tó at hava fyrivarni fyri óvissu í uppgerðum av produktivitetsvøkstri í Føroyum. Verður hugt eftir uppgerðum hjá Hagstovu Føroya av bruttotjóðarúrtøku, lønmóttakarum og prísgongd, fæst at produktiviteturin er vaksin umleið 0,5% um árið í miðal tíðarskeiðið 1999-2009. Seinastu árini hevur produktivitetsvøksturin í flestu av okkara grannalondum verið um 1-2% um árið í miðal. Miðaltalið fyri føroyska búskapin skal tó lesast við fyrivarni. Sveiggini eru stór, og miðaltøl kunnu lættliga ávirkast av einstøkum árum.

Umleið 10% av virðisøkingini í føroyska búskapinum stava frá tilfeingisvinnum.[1] Hetta er hægri enn í grannalondunum. Produktivitetsvøksturin í tilfeingisvinnum sveiggjar nógv frá ári til ár orsakað av, at atgongdin til tilfeingi er óstøðug. At lutfalsliga stórur partur av virðisøkingini í Føroyum stavar frá tilfeingisvinnum merkir m.a., at produktivitetsvøksturin er meira óstøðugur enn í grannalondunum. Hagtøl um bruttovirðisøking, lønmóttakarar og prísgongd benda á, at produktiviteturin í tilfeingisvinnunum í miðal er fallin 2,3% um árið tíðarskeiðið 1999-2009.

Produktivitetsvøkstur er treytaður av m.a. útbúgvingarstignum hjá arbeiðsmegini, mongdini av kapitali, undirstøðukervi, spjaðing av vitan, góðsku á (ný)íløgum, kappingartrýsti innlendis og uttanífrá, o.tíl. At marknaðir fyri vørur, tænastur, kapital, arbeiðsmegi eru vælvirkandi hevur eisini stóran týdning fyri produktivitetsvøkstur, t.e. at vinnur verða viðgjørdar eins, at vinnan fær lagað seg til broyttar umstøður o.tíl. Somuleiðis hevur tað týdning, at tað almenna rekur skilagóðan og haldføran fíggjar- og bygnaðarpolitikk.

At kostnaðarstigið í Føroyum frádrigið flutningskostnaðir er høgt sammett við aðrastaðni bendir á, at kappingartrýstið er lutfalsliga lágt í Føroyum. Hetta kann hugsast at vera ein orsøk til lága produktivitetsvøksturin í Føroyum. Aðrar orsøkir eru helst fáar privatar íløgur síðstu árini og at góðskan á íløgum hevur verið undir miðal.

Í fiskivinnuni eru fleiri viðurskifti, sum darva produktivitetsvøkstri. M.a. kann nevnast, at veiðutrýstið síðstu 15 árini í miðal hevur verið umleið tvær ferðir veiðutrýstið, ið hevði givið mest búskaparliga og lívfrøðiliga. Harafturat er tvørligt hjá nýggjum luttakarum at fáa atgongd til fiskivinnuna og meira lønandi fiskiskip hava ilt við at troka minni lønandi fiskiskip av marknaðinum og úr vinnuni. Eins og verður viðgjørt nærri í ritinum, eru ásetingar í lóg um vinnuligan fiskiskap, sum forða fiskivinnuni at laga seg til nýggjar og broyttar umstøður.

[1] Talið hevur verið javnt fallandi frá uml. 22% í 1998 til uml. 11% í 2009.

PRODUKTIVITETUR OG BÚSKAPARVØKSTUR

Produktivitetsvøkstur er fortreytin fyri, hvørt livistøðið kann vera hækkandi yvir eitt longri tíðarskeið. Virðið á framleiðsluni í einum landi er treytað av hvussu nógv verður nýtt av arbeiðsmegi, kapitali og øðrum framleiðslufaktorum[2] og av produktivitetinum.[3]

Lutfalsliga stór óvissa er knýtt at uppgerðum av produktiviteti í Føroyum orsakað av, at uppgerðir av tjóðarroknskapinum í føstum prísum eru ikki tøkar. Brúkaraprístalið verður tí nýtt sum ábending um gongdina í framleiðsluprísum. Uppgerðir av produktiviteti í Føroyum eru tí at meta sum vegleiðandi. Miðaltøl fyri produktivitetsvøkstur yvir longri áramál kunnu tó metast sum ábendingar um gongdina í produktivitetinum.

Mynd 1 vísir gongdina í produktivitetsvøkstrinum í Føroyum tíðarskeiðið 1999-2009, býtt á útvaldar vinnugreinar. Vøksturin í produktivitetinum er roknaður sum %-vøkstur í bruttovirðisøkingini fyri hvønn lønmóttakara frádrigið vøksturin í brúkaraprístalinum.

Á myndini sæst, at stór sveiggj eru í produktivitetsvøkstrinum í Føroyum, og at sveiggini eru serliga stór í tilfeingisvinnunum. Sveiggini stava frá, at atgongdin til náttúrutilfeingi er óstøðug, alt eftir hvussu gróðrarlíkindini eru undir Føroyum og eftir hvussu fiskastovnar verða troyttir. Av tí at atgongdin til náttúrutilfeingi er óstøðug, verður virðisøkingin fyri hvønn lønmóttakara somuleiðis óstøðug.

Produktivitetsvøkstur í Føroyum 1999-2009 býttur á vinnugreinar MYND 1



Viðm.: Produktivitetsvøkstur er her roknaður sum %-vøkstur í bruttovirðisøking fyri hvønn lønmótakara. Brúkaraprístalið er nýtt sum ábending um prísgongd.
Kelda: Hagstova Føroya og egnar útrokningar.

Miðalvøksturin í produktivitetinum hevur verið umleið 0,5% um árið tíðarskeiðið 1999-2009 fyri allan búskapin uttan almennar tænastur. Hetta er lágt sammett við flestu grannalondini. Á mynd 1 sæst eisini, at produktiviteturin í tilfeingisvinnunum í miðal er fallin 2,3% um árið tíðarskeiðið 1999-2009. Produktivitetsvøksturin í tilfeingisvinnunum sveiggjar tó somikið nógv, at einstøk ár

[2] T.d. jarðarlendi og náttúrutilfeingi.
[3] Sí [3], [4], [5] og [12].

kunnu ávirka miðaltalið munandi. Eisini er greitt, at vánaligi fiskiskapurin frá 2007 og frameftir ávirkar miðalvøksturin 1999-2009 nógv.

Produktivitetsvøkstur ávirkast av ymsum viðurskiftum. Mongdin av kapitali, útbúgvingarstigið, mongdin av og góðskan á (ný)íløgum o.til. ávirka produktivitetin hjá arbeiðsmegini. Kapitalur skal her fatast í breiðari merking og fevnir um m.a. maskinur, amboð, vinnutól, útbúnað og undirstøðukervi, t.e. veganet, havnarløg, orku- og vatnverk, flogvallaumstøður, vitanarspjaðing, atgongd til og útbreiðsla av interneti, KT og samskiftistøkni o.til. Somuleiðis hevur tað týdning fyri produktivitetsvøkstur, at tað almenna rekur skilagóðan og haldføran fíggjar- og bygnaðarpolitikk.[4]

Tað hevur eisini stóran týdning fyri produktivitetsvøkstur, at marknaðir fyri vørur, tænastur, arbeiðsmegi og kapital eru vælvirkandi, t.e. at vinnur verða viðgjørdar eins, at frels kapping er á vøru- og tænastumarknaðum, at samhandil er av vørum og tænastum við onnur lond, at arbeiðsmegi flytur millum vinnugreinar, at vinnulívið tekur vitan og nýggjar framleiðsluhættir uttaníframá til sín o.t.[5]

Kanningar av produktivitetsvøkstri í fyritøkum benda á, at umleið 70% av produktivitetsvøkstri stava beinleiðis frá kappingartrýsti millum fyritøkur,[6] t.e. at nýggjar fyritøkur hava lætta atgongd at sleppa inn á marknaðir, at meira lønandi fyritøkur hava møguleika at troka minni lønandi fyritøkur av marknaðum o.til.

[4] Sí [10], [12] og [8].

[5] Sí [1], [8], [9] og [12].

[6] Sí [1] og [8].

PRODUKTIVITETSVØKSTUR 1999-2009

Talva 1 vísir produktivitetsvøkstur býtt á lond og fyri ymisk tíðarskeið. Talvan vísir, at flestu lond síðstu umleið 40 ár hava havt produktivitetsvøkstur á umleið 2% um árið í miðal. Í tíðarskeiðinum 2000-2008 hevur produktivitetsvøksturin verið nakað lægri – helst m.a. orsakað av at londini hava verið gjøgnum ein drúgvan hákonjunktur við kapasitetstrýsti í fleiri londum, við stórum vøkstri og íløgum í byggivinnuni, við vøkstri í almennum tænastum og við óvanliga lágum arbeiðsloysi í fleiri londum. Á talvu 1 sæst eisini, at produktivitetsvøksturin í Føroyum hevur verið lægri enn í flestu grannalondunum.

Produktivitetsvøkstur, % um árið í miðal — TALVA 1

Land	1970-2008	2000-2008	1999-2009
Danmark	2,0	0,3	ei tøkt
Ísland	2,5	3,0	ei tøkt
Noreg	2,7	1,1	ei tøkt
Finnland	3,0	1,9	ei tøkt
Svøríki	1,7	1,8	ei tøkt
Stóra Bretland	2,3	1,9	ei tøkt
USA	1,7	2,0	ei tøkt
G7 - londini	2,2	1,7	ei tøkt
Føroyar	ei tøkt	0,7	0,5

Við m.: Produktivitetur er her roknaður sum %vøkstur í bruttotjóðarúrtøku fyri hvønn lønmóttakara. Fyri Føroyar er brúkaraprístalið nýtt sum ábending um prísgongd. Samanberingar millum lond og serliga við føroysku tølini skulu gerast við fyrivarni, orsakað av at OECD ger arbeiðsproduktivitet upp við arbeiðstímum tilsamans.
Kelda: Hagstova Føroya, OECD og egnar útrokningar.

Mynd 2 og 3 vísa produktivitetsvøkstur í % um árið býtt á útvald lond. Gongdin í produktivitetsvøkstrinum hevur sum heild verið fallandi í flestu londunum síðstu umleið tíggju árini.

Produktivitetsvøkstur 1999-2009 býttur á lond — MYND 2



Við m.: Produktivitetsvøkstur er fyri Føroyar roknaður sum %vøkstur í bruttotjóðarúrtøku (BTÚ) fyri hvønn lønmótakara. Brúkaraprístalið er nýtt sum ábending um prísgongd. Samanberingar millum lond og serliga við føroysku tølini skulu gerast við fyrivarni, orsakað av at OECD og Danmarks Statistik gera arbeiðsproduktivitet upp við arbeiðstímum tilsamans.
Kelda: Hagstova Føroya, OECD, Danmarks Statistik og egnar útrokningar.

Mynd 2 og 3 vísa eisini, at sveiggini í produktivitetsvøkstrinum í Føroyum eru stór sammett við í øðrum londum. Sveiggini stava sum áður nevnt frá, at tilfeingisvinnurnar standa fyri stórum parti av virðisøkingini í Føroyum.

Produktivitetsvøkstur 1999-2008 býttur á lond MYND 3



Viðm.: Samanberingar millum lond og serliga við føroysku tølini skulu gerast við fyrivarni, orsakað av at OECD og Danmarks Statistik gera arbeiðsproduktivitet upp við arbeiðstímum tilsamans.
Kelda: OECD.

Orsøkirnar til lutfalsliga lága produktivitetsvøksturin í Føroyum eru óivað fleiri og neyvan kendar við vissu. Afturgongdin í fiskivinnuni 2007-2009, sum bæði var orsakað av minkandi veiðunøgdum og falli í fiskaprísum, ávirkar t.d. vøksturin nógv. Aðrar orsøkir eru mest sannlíkt, at lutfalsliga fáar privatar íløgur eru gjørdar síðstu árini, umframt at góðskan (t.e. evnini at økja um framleiðsluna) á íløgunum helst hevur verið undir miðal. M.a. eru stórar íløgur gjørdar í byggningar. Enn ber illa til at siga nakað neyvt um góðskuna á íløgunum, sum eru gjørdar síðstu árini, men næstu árini koma helst at vísa, hvørji evni tær hava havt at økja um framleiðsluna í føroyska búskapinum.

Mynd 4 á næstu síðu vísir bruttoíløgur fyri útvald lond í % av BTÚ. At døma eftir myndini eru bruttoíløgur í Føroyum áleið líka stórur partur av BTÚ sum í flest øðrum londum. Uppgerðir av tjóðarroknskapinum benda tó á, at heldur færri privatar íløgur verða gjørdar í Føroyum og at tað almenna stendur fyri lutfalsliga stórum parti av íløgunum sammett við í øðrum londum.

Stóri búskaparvøksturin, kapasitetstrýstið í búskapinum og óvanliga lága arbeiðsloysið hava mest sannlíkt eisini gjørt, at produktivitetsvøksturin hevur verið lægri enn undir vanligum umstøðum, umframt at kappingartrýstið í búskapinum helst ikki hevur verið serliga høgt tey síðstu árini við hákonjunkturi.[7] At kostnaðarstigið á fleiri vøru- og tænastumarknaðum er hægri í Føroyum sammett við í grannalondum er harafturat tekin um lægri kappingartrýst, og at marknaðir ikki eru eins vælvirkandi og í fleiri øðrum londum.

Veiðutrýstið undir Føroyum hevur síðstu 15 árini í miðal verið umleið tvær ferðir tað veiðutrýst, ið hevði givið mest búskaparliga og lívfrøðiliga.[8] Givið er, at hetta hevur avmarkað framleiðsluna í fiskivinnuni og við hesum eisini produktivitetsvøkstrinum. Høga veiðutrýstið er soleiðis ein orsøk til lága produktivitetsvøksturin. Ein onnur forðing fyri produktivitetsvøkstri í fiskivinnuni er, at undir verandi skipan er tvørligt hjá nýggjum luttakarum at fáa atgongd til vinnuna. Tað almenna lutar út veiðiloyvi, ið eru galdandi yvir eitt longri áramál, sum fyri nýggjar luttakarar í vinnuni kunnu vera trupul at fáa fígging til. Longu veiðiloyvini gera tað eisini trupult hjá fiskiskipum, ið eru meira

[7] Søguliga sæð hevur produktivitetsvøkstur heldur sveiggjað sama veg sum búskaparvøkstur, t.e. hevur sum heild verið vaksandi í hákonjunkturum og fallandi í lágkonjunkturum, sí [2] og [12].

[8] Sí [7] og [11].

lønandi (t.e. meira produktiv) at troka minni lønandi fiskiskip av marknaðinum og úr vinnuni.[9] Skipanin við almennari inntøkutrygd í fiskivinnuni ger eisini, at tað verður trupult hjá meira lønandi fiskiskipum at troka minni lønandi fiskiskip av marknaðinum og úr vinnuni.

Bruttoíløgur 1998-2009 í % av BTÚ býtt á lond MYND 4



Viðm.: Samanberingar millum lond skulu gerast við fyrivarni. Íløgur verða ikki gjørdar upp eins frá landi til land.
Kelda: Hagstova Føroya, OECD.

Fyri serliga fiskivinnuna undir Føroyum eru fleiri viðurskifti, sum darva produktivitetsvøkstri. M.a. eru mørk fyri, hvussu stórur partur av veiðuni kann avreiðast uttanlands, og reglur eru móti tilvirking av fiski umborð á fiskiskipum, ið royna undir Føroyum. Avmarkingarnar darva produktivitetsvøkstri og forða vinnuni at laga seg til nýggjar og broyttar umstøður. Harafturat hevur arbeiðsmegin í fiskivinnuni skattligar fyrimunir framum arbeiðsmegi í øðrum vinnum umframt eina skipan við almennari inntøkutrygd, sum kunnu forða fyri, at arbeiðsmegin leitar sær í vinnur við hægri produktiviteti. Av tí at fiskivinnan ikki rindar fyri atgongdina til náttúrutilfeingi kann eisini hugsast, at ov nógvar íløgur verða gjørdar í vinnutól í fiskivinnuni. Úrslitið av hesum er m.a., at veiðikapasiteturin verður ov stórur sammett við veiðuna, sum fiskastovnarnar kunnu bera.

[9] At veiðuloyvi ikki verða lutað út eftir marknaðarligum treytum darvar eisini produktivitetsvøkstri í fiskivinnuni.

NIÐURSTØÐUR

Nakrar av høvuðsniðurstøðunum í ritinum eru, at:

- Tekin eru um lutfalsliga lágan produktivitetsvøkstur í Føroyum síðstu umleið tíggju árini.
- Uppgerðir av tjóðarroknskapinum benda á, at produktivitetsvøksturin hevur verið umleið 0,5% um árið í miðal síðstu umleið tíggju árini.
- Í flestu av grannalondunum er produktiviteturin í miðal vaksin 1-2% um árið síðstu tíggju árini.
- Uppgerðir av tjóðarroknskapinum benda eisini á, at produktiviteturin í miðal er *fallin* 2,3% um árið í tilfeingisvinnunum síðstu umleið tíggju árini.
- Skal inntøku- og livistigið í Føroym framhaldandi vera sambærligt við livistigið í okkara grannalondum, er neyðugt, at stig verða tikin til bygnaðarligar reformar, sum kunnu økja um produktivitets- og búskaparvøkstur næstu árini.
- Serliga fyri fiskivinnuna undir Føroyum eru fleiri viðurskifti, sum darva produktivitetsvøkstri. M.a. kann nevnast
    - at veiðutrýstið er ov høgt – umleið tvær ferðir veiðutrýstið, ið hevði givið mest búskapar- og lívfrøðiliga. Hetta darvar produktivitetsvøkstri í fiskivinnuni.
    - at tvørligt er hjá nýggjum luttakarum at fáa atgongd til fiskivinnuna.
    - at ásetingar og reglur eru, sum forða fiskivinnuni at laga seg til nýggjar og broyttar umstøður. M.a. eru mørk fyri hvussu stórur partur av veiðuni kann avreiðast uttanlands og forboð er móti tilvirking av fiski umborð á skipum, sum royna undir Føroyum.
    - at veiðuloyvi undir verandi skipan ikki verða lutað út eftir marknaðarligum treytum, og hetta darvar produktivitetsvøkstri í fiskivinnuni.

BÓKMENTIR

[1] J.R. Baldwin og W. Gu. Competition, Firm Turnover and Productivity Growth. Economic Analysis Research Paper Series No. 42, Statistics Canada. Frágreiðing tøk á www.statcan.gc.ca/pub/, 2006.

[2] Susanto Basu og John Fernald. Why is Productivity Procyclical? Why Do We Care? NBER Working Paper No. 7940. Tøkt á www.nber.org/papers/w7940, 2000.

[3] Carl-Johan Dalgaard og Henrik Hansen. Er der et dansk produktivitetskollaps? Economic Policy Research Unit Analyse nr. 27. Frágreiðing tøk á www.econ.ku.dk/epru/publications/policyanalysis/, februar 2010.

[4] Danmarks Nationalbank. Produktivitetsudviklingen i Danmark. Kvartalsoversigt, 4. kvartal 2007, bls. 69-80. Tøkt á www.nationalbanken.dk, september 2008.

[5] Danmarks Nationalbank. Vækst, offentlige finanser og indvandring. Kvartalsoversigt, 3. kvartal 2008, bls. 113-123. Tøkt á www.nationalbanken.dk, september 2008.

[6] Det Økonomiske Råd. Dansk Økonomi, forår 2003. Tøkt á http://www.dors.dk/sw3321.asp, 2003.

[7] Havstovan. Tilmælið fyri fiskiárið 2010/2011. Tilmæli um áseting av fiskidagatali tøkt á www.frs.fo, 2010.

[8] Konkurrencestyrelsen. Konkurrence – vækst og velfærd. Konkurrenceanalyse 01/2009. Frágreiðing tøk á www.konkurrencestyrelsen.dk, 2009.

[9] Boileau Loko og Mame Astou Diouf. Revisiting the Determinants of Productivity Growth: What's New? IMF Working Paper WP/09/225. Frágreiðing tøk á www.imf.org/external/pubind.htm, oktober 2009.

[10] OECD. The Sources of Economic Growth in OECD Countries. Frágreiðing tøk á www.oecd.org, 2003.

[11] Jákup Reinert. Fundur í ráðgevandi nevndini (ACOM) hjá Altjóða Havrannsóknarstovninum (ICES) í mai/juni 2010. Havstovan smárit 10/04. Tøkt á www.frs.fo, 2010.

[12] Økonomi og Erhvervsministeriet. Den danske produktivitetsudvikling. Økonomisk tema nr. 8. Frágreiðing tøk á www.oem.dk, november 2009.

Landsbanki Føroya

GOVERNMENTAL BANK

Landsbanki Føroya | Yviri við Strond 15 | P.O.Box 229 | FO-110 Tórshavn | Faroe Islands | Tel. +298 350300 | Fax +298 350301
www.landsbankin.fo | landsbankin@landsbankin.fo | VTal: 382809